# Ongin sjálvberandi búskapur!

KRONIKK
*Reidar Nónfjall*



## Ein stuðulsborðin búskapur

Í hesi greinini verður lýst, hvussu nógv og skjótt føroyski búskapurin førkar seg frá at gerast ein sjálvberandi búskapur og hvussu heftur búskapurin í veruleikanum er at ríkisveitingini og váðatengdum inntøkum.

Føroyar hava altíð í nýggjari tíð verið ein búskapur borðin uppi av donskum stuðli – ein umfatandi stuðul til íløgur og rakstur, sum serliga seinastu 40 árini er latin við tí endamáli skjótt at menna føroyska samfelagið innan almanna og heilsuøkið, skúlaøkið, vegir og lendingar o.a.

Um so er, at hesin stuðul ikki varð latin føroyska samfelagnum kann einhvør ímynda sær, at ongi fólk vóru búgvandi her á klettunum. Føroyar eru sum samfelag og vinna í kapping við útlandi og hava td. føroyingar ikki somu møguleikar sum onnur í grannalondunum, so flyta teir. Tí hevur stuðulin frá Danmark havt avgerandi týdning fyri at búgva í landinum við einum vælferðarstøði á hædd við onnur.

Øll kunnu vit semjast um, at tað besta fyri Føroyar varð, um landið kundi ment seg vinnuliga til at klára seg sjálvt búskaparliga - uttan ríkisstuðul. Men hetta kann bara gerast við einari størri, sterkari, sunnari og kappingarførari útflutningsvinnu. Tað eru nógv greið tekin um, at føroysk vinna ikki megnar at kompensera eina minking í ríkisstuðlinum og ongi útlit eru fyri at hetta hendir komandi 20–30 árini.

Tær minkingar, sum gjørdar eru í ríkisstuðlinum eru gjørdar undir hákonjunkturum ella við stórum búskaparvøkstri frá td. fiskivinnuni og avsmittandi vøkstri frá útlandinum. Tá nú lágkonjunkturur kemur í búskapin vanta hesir peningar i, sum seinastu tíðina eru skornir av ríkisstuðlinum – tí hava vit m. a. eitt stórt hall á fíggjarlógini fyri 2009. Tað eru sostatt ongar bygnaðarligar og aðrar grundleggjandi broytingar gjørdar, sum málrættað virka fyri, at føroyski búskapurin varandi kann gerast sjálvberandi. Politiska arbeiðið byggir á passivitet og ongar ítøkjuligar handlingar, sum stuðla uppundir málið at gerast búskaparliga sjálvberandi.

## Langt frá sjálvberandi búskapi

Føroyki búskapurin hevur ongantíð verið longri burtur frá at kunna bera seg sjálvan, sum seinastu 6 árini – íroknað 2008. Ella sagt við øðrum orðum, føroyski búskapurin er vorðin fullkomuliga heftur at árliga ríkisstuðlinum uppá 615 mió. kr. Harafturat koma útreiðslur til rakstur av ríkisstovnum uppá umleið 350 mió.kr. árliga.

So tá ávísir politiskir flokkar, eitt nú Fólkaflokkurin og Tjóðveldi, uppí saman nevna sjálvberandi búskap sum eitt aðalmál í teirra politisku stevnuskrá og eisini samgonguskjølum – so er veruleikin og útgangsstøðið sera langt frá idealmálinum og dreyminum. Hugtakið ”ein sjálvberandi búskapur” er tí alt meira eitt abstrakt og veruleikafjart hugtak, sum er meira politiskt og tjóðskaparligt kensluborið enn grundað á fakts.

Ein gjøgnumgongd av handilsjavnanum seinastu árini og higartil 2008 vísir eina greiða mynd av, hvønn veg tað ber og hvussu skjótt gongdin ber frá málinum um ein sjálvberandi búskap.

Tøl frá samhandlinum hjá Føroyum vísa heilt greitt, at tað er ein stór gjógv millum inn- og útflutning av vørum. Í td. 2006 varð virðið av innflutninginum av vørum og tænastum 6,059 mia. kr. og á útflutninginum 4.905 mia. kr. Sostatt varð hallið á vøru- og tænastujavnanum 1.154 mió.kr. í 2006, svarandi til heili 24% av tí samlaða útflutningsvirðinum. Henda støðan svarar nøkunlunda til støðuna í Grønlandi.

## Hvat er ein sjálvberandi búskapur

Ein sjálvberandi búskapur er ein búskapur, sum varandi klárar seg sjálvan uttan ríkisstuðul ella peningagávur frá einum øðrum landi og sum uttan stuðul megnar at geva borgarunum eina vælferð á jøvnum føti við grannalondini.

Høvuðsfortreytirnar fyri einum sjálvberandi búskapi eru m.a.

- Náttúrugivið tilfeingi og veðurlag
- Landastøðd, fólkagrundarlag (humane kapital) og búsetingarmynstur – meginøkið kontra útjaðari
- Geografisk plasering og topografi
- Tøkniligt støði
- Innan- og uttanhýsis kommunikatiónsviðurskifti
- Útbúgvingarstøði (grund-, millum- og hægri útbúgvingar)
- Umstillingarevnir
- Infraskipan
- Samhandilsfelagskapir
- Hóskandi lutfall millum almenna og privata sektorin.

Nakrar av fortreytunum eru til staðar í Føroyum, meðan nakrar ikki eru tað og verða tað ongantíð ella muga mennast frá grundini av. Somuleiðis vil tað taka nógv ár at skapa nakrar av fortreytunum. Eitt gott dømið uppá álvarsligar bygnaðartrupulleikar í sambandi við ein sjálvberandi búskap, er vantandi fólkavøksturin, skeiva aldurssamansetingin og skeiva útbúgvingarliga samansetingin av arbeiðsføra fólkinum (vit útflyta humane kapital ella fólk við kappingarførari útbúgving). Harafturat er nakað, sum bendir á, at almenni sektorurin fyllir alt meira í samlaða búskapinum.

## Handilsjavnin

Seinastu árini hevur handilsjavnin víst fylgjandi árlig hall (bara vørur - innfl. cif og útfl. fob):

- hall 953 mió.kr. í 2003 (útfl. 3.912 mió.kr, og innfl.4.866 mió.kr.)
- hall 74 mió.kr. í 2004
- hall 904 mió.kr. í 2005
- hall 823 mió.kr. í 2006
- hall 1,277 mió.kr. í 2007 – metár
- hall 780 mió.kr., higartil sept. 2008.




*Hendan talvan vísir, hvussu stórt hall Føroyar hava havt seinastu árini í samhandlinum við útlond. Umframt allar vørur eru eisini allar tænastur taldar við; eitt nú ráðgeving, ferðavinna o.s.fr. Sum tað sæst á strikuni tvørtur ígjøgnum myndina, vigar blokkurin bara upp fyri einum parti av hesum halli, uttan í 2004*

Á myndini er løgd iin ein linja, sum vísir, hvussu nógv ríkisstuðulin uppá 615 mió.kr. árliga fulnar av hallinum á vøru- og tænastujavnanum – restin av hallinum verður fulnað við m.a. inntøkuflytingum. Spurningurin er so, hvussu leingi við kunnu roknað við, at inntøkuflytingnar fulna hallið, orsaka av búskapar- og fíggjarkreppuni, sum eisini fer at raka føroyska búskapin frá 2008.

Ongin vøkstur er í útflutningsvirðinum av vørum í tíðarskeiðnum 2003-2008, meðan stórur vøkstur er í innflutningsvirðinum (undantikið 2004). Eisini er eitt árligt hall frá tænastum uppá umleið 500 mió.kr. sama tíðarskeið. Hetta merkir, at talan er um eitt hall á vøru- og tænastujavnanum uppá 1,2 til 1,3 mia.kr. í tíðarskeiðnum 2003-2006 – untantikið ár 2004. Vit kunnu siga, at hetta er búskaparliga úrslitið hjá fyritøkuni Føroyar viðvíkjandi grundrakstri mótvegis útlandinum.

Vantandi hækkingin í útflutninginum í fleiri ár á rað og vantandi innflutningur av hátøkni til nýggjar vinnur, er eitt greitt tekin um, at føroyska vinnan sum heild, ikki hevur havt hækkingar innan effektivitet og produktivitet – sostatt er nakað, sum bendir á, at kappingarførið er óbroytt og heldur fer at versna.

Føroyska útflutningsvinnan hevur seinastu árini ikki megnað at kompenserað fyri hækkandi innflutningsprísum og hægri nøgdum av innfluttum vørum og tænastum.

Støðan á handilsjavnanum er eitt greitt tekin um, at føroyski búskapurin, tvs. grundraksturin í samfelagnum, hevur álvarsligar bygnaðartrupulleikar og at tað, sum í síðsta enda heldur lív í føroyska búskapinum og skapar vælferðina, eru inntøkuflytingar netto frá útlandinum (td. lønir og ognarinntøkur) og rakstrarinntøkur (td. blokkstuðulin). Tí er avgerandi fyri búskaparstøðuna mótveigs útlandinum, hvat gjaldsjavnin vísir, herundir kapitaljavni (ogn og skuld uttanlands).

## Gjaldsjavnin

Gjaldsjavnin vísir alt búskaparligt millumverandi við útlandi – vørur, tænastur, inntøkuflytingar og rakstrarflytingar. Tað framgongur av búskaparhagtølunum, at stóra hallið frá vørum og tænastum verður fíggjað við ognarinntøkum netto frá útlandinum (avkast frá virðisbrøvum o.a.) og blokkstuðlinum. Hesar serligu inntøkur hava við sær, at gjaldsjavnin hevur víst umleið javnvág í tíðarskeiðnum 2003-2006 - untantikið 2004, sum gav eitt stórt avlop. Hetta merkir td., at varð ríkistuðulin skorðin allur burtur, so íkom eitt tilsvarandi hall á gjaldsjavnanum, sum onkursvegna skuldi fíggjast við fremmandafígging.

Landskassin fekk herfyri frá *Modey´s* eina kredit-*rating* til Aa2, sum er 3. hægsta. Ein slík meting inniber m.a., at lánsveitarar kunnu hava álit á føroyska búskapin og at landskassin kann lána á altjóða marknaðum fyri kappingarføran kostnað. Men tað er væl skiljandi, at kredit-*ratingin* hjá *Modey´s*, av føroyska búskapinum útilokandi er treytað av ríkisstuðlinum – ein føst rakstrarflyting, sum kemur uttan eina realframleiðslu aftanfyri og sum danski staturin er garantur fyri.

*Ratingin* av føroyska búskapinum er í veruleiknum treytað av danska kreditvirðinum – vísandi til, at danski staturin undir búskaparkreppuni fyrst í 1990´unum hevði skyldu at bjarga Føroyum sum integeraður partur av danska kongaríkinum. Tað ber heilt einfalt ikki til, at ein partur av ríkinum fer á heysin ella hevur eitt kreditvirðið, sum ikki hongur nøkunlunda saman við hinum partinum av ríkinum.

## Konjunkturelt ella bygnaðarliga sjálvberandi búskapur

Tað er greitt, at tær skerjingar, sum gjørdar eru í blokkstuðlinum, eru gjørdar í tíðarskeiðum við hávøkstri uttanífrá, góðum fiskaskapi o.a., og ikki umvegis málrættaðar bygnaðarbroytingar Tað er eisini greitt, at raðfylgjan at skerja blokkstuðulin byggir á eitt model, sum kann kallast - *skjóta fyrst, spyrja aftaná.*

Politiskt er blokkstuðulin skerdur uttan greið mið og mál - halda fyri eygu og oyru og vóna síðan, at okkurt hendir í sambandi við ein sjálvberandi búskap. Men búskaparliga gongdin vísir beint tað øvugta – vit førka búskapin enn longur burtur frá einum sjálvberandi búskapi og gerast enn meira heft, at ríkisstuðlinum og øðrum váðatengdum inntøkum. Hetta heftni fer at fyrikoma enntá undir stabilum búskaparligum viðurskiftum og fortreytum, sum við muga liva við frá nú av.

## Ítøkilig politisk tiltøk ímóti sjálvberandi búskapi

Tað gevur ikki meining politiskt at seta mál um ein sjálvberandi búskap uttan ítøkjulig tiltøk, sum stuðla uppundir eina málarættaða og skipaða tilgongd.

Tað kann staðfestast, at tað ongantíð er farin fram ein málarættað og skipað politisk tilgongd til ein sjálvberandi búskap – hetta sæst best við, at yvirtøkur og niðurskurður í ríkisstuðlinum eru framdur í hákonjunkturum, tá búskarparligi vøksturin partvíst er komin uttanífrá. Ein roynd at seta í verk eina skipaða tilgongd varð kortini gjørd, tá Høgni Hoydal stovnaði Sjálvstýrisverkætlanina. Henda verkætlan hevði tíverri ikki nakrar bygnaðarligar og fíggjarligar broytingar við sær og harvið ítøkjulig úrslit ímóti einum sjálvberandi búskapi.

Tað eru ongi tekin, hvørki í samgonguskjalinum ella fíggjarlógini 2009, sum benda á, at tað verða tikin íøkjulig bygnaðarlig stig til ein sjálvberandi búskap. Ein tilvildarlig yvirtøka hist og her hevur onki við eitt málrættað arbeiði at gera á leiðini til ein sjálvberandi búskap og flytir onki uppá longri sikt. Tað landsstýrið risikerar við verandi tilvildarligu tilgongd, er at løgtingið noyðist at biða danir økja blokkstuðulin aftur, vegna nærmast varandi hall á fíggjarlógini ella gjaldsjavnanum.

Fortreytirnar fyri at skapa ein